# Royna enn at loysa knútin í Tórhavnar Býráð

**Sakførar skulu nú royna at finna gongdar leiðir burturúr trætuni ímillum Tórshavnar Býráð og starvsfólkið**

STARVSFÓLKAPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Trætan ímillum Tórshavnar Býráð og starvsfólkið hjá býráðnum er ikki loyst enn. Sostatt er enn ógreitt, hvussu farast skal fram, tá ið starvsfólk hjá býráðnum fara í býin í privatum ørindum í arbeiðstíðini og um tey skulu dragast í løn, tá ið tey fara til lækna ella tannlækna í arbeiðstíðini, ella tá ið tey fara at fylgja líki og talan ikki er um allarnæstu skyldfólk

Men tað er gongd í málinm. Higartil hava tveir fundir verið ímillum býráðið og fakfeløgini, sum umboða starvsfólkið í býráðnum.

Á tí seinna fundinum, sum var mánadagin, skeyt býráðið upp, at sakførararnir hjá báðum pørtum arbeiddu víðari við málinum og komu við uppskotum um, hvussu trætan kann loysast.

Hetta góðtóku fakfeløgini fyrrapartin í gjár.

### Bara talan um uppskot

Men Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, ið umboðar nógv av starvsfólkunum, leggur dent á, at sakførararnir hava bara fingið heimild til at koma við uppskotum. Teir hava ikki fingið heimild til at seta nakað í verk, tí tað verða ongar mannagongdir broyttar, uttan at fakfeløgini góðtaka tað.

*Tað, sum Tórshavnar Býráð hevur gjørt, eigur at vera øðrum ein læra, tí tað er besta dømi um, hvussu ein arbeiðsgevari ikki skal bera seg at ímóti sínum starvsfólki, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum*

Ímeðan sakførararnir stinga høvdini saman, arbeiðir starvsfólkið eftir teirri siðvenjuni, sum hevur verið galdandi í nógv ár. Sostatt verður starvsfólkið ikki drigið í løn, tá ið tey fara í býin í privatum ørindum.

Gunnleivur Dalsgarð leggur eisini dent á, at fakfeløgini hava onki ímoti, at greiðar reglar verða settar í gildi fyri, hvussu farast skal fram, tá ið starvsfólk hjá býráðnum fara í býin í privatum ørindum í arbeiðstíðini.

– Men ígjøgnum árini hevur ein ávís siðvenja arbeitt seg upp á økinum. Hóast hesar siðvenur ikki eru skrivaðar í sjálvan sáttmálan, eru tær nú so gamlar, at tær hava líka gott gild isum sjálvur sáttmálin.

– Sostatt kunnu mannagongdirnar ikki broytast, uttan í samráð við fakfeløgini, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum, serliga ikki, tá ið tað hevur fíggjarligar avleiðingar fyri starvsfólkið.

Hann sigur, at hetta er eitt mál, sum fakfeløgini taka í størsta álvara.

– Og skuldi tað verið aðrar kommunur, ella onnur arbeiðspláss, ið umhugsa nakað tað sama, sum Tórshavnar Býráð eigur hetta at vera teimum ein læra, tí hetta er eitt skúladømi um, hvussu ein arbeiðsgevari ikki eigur at fara fram ímóti sínum starvsfólkum, leggur Gunnleivur Dalsgarð afturat.

# Brek á gomlum kaðali

**Hvalbingar og Sandvíkingar mistu streymin mánadagin. Tey bæði næstu árini verða ábøtur gjørdar, sum skuldi verðið ein munandi hjálp**

STREYMSLIT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

**Suðuroy:** Tá ið hvalbingar og sandvíkingar vaknaðu mánamorgunin og skuldu gera seg til reiðar at fara til dagsins gerning, var bæði kalt og myrkt, tí tíðliga um morgunin var farin.

Manning frá SEV fó beinanvegin at kanna brekið. Tað var eisini skjótt, at teir funnu útav, at brek var á einum gomlum kaðali við gamla Skúla í Hvalba á linjuni, sum gongur til Sandvíkar. Sostatt var Hvalba kobla til aftur, so at tey fingu streym aftur nakað fyri arbeiðstíð.

Men av tí, at brekið var á linjuni til Sandvíkar, fingu sandvíkingar ikki streymin aftur, fyrrenn á miðdegi mánadagin.

SEV riggaði ein motor til, sum veitir flakavirkinum í Hvalba og Sandvík streym ímeðan brekið varð umvælt og hann varð settur til á miðdegi.

Mathias Lassen, kaðal- og linjumeistari hjá SEV í Suðuroy, sigur, at allan mánadagin varð arbeitt við at grava upp og leggja útvið 100 metrar av kaðali av nýggjum á linjuni til Sandvíkar. Talan er um ein kaðal, sum er frá 1959.

Fyrrapartin í gjár væntaði hann, at arbeiðið varð liðugt seinnapartin í gjár.

Tá skuldi streymurin aftur takast í umleið ein hálvan tíma ímeðan kaðalin varð bundin í aftur.

Mathias Lassen sigur, at øll linjan ímillum Tvøroyri og Hvalba er eisini frá 1959 og tí er hon ikki álitandi longur.

Og í summar verður nýggjur kaðal lagdur ímillum Tvøroyri og Hvalba.

Ímillum Hvalba og Sandvík varð nýggjur tráður lagdur í 1992, men á sumri í 2005, verða teir pelarnir skiftir út og nýggjur tráður lagdur, tí hann er ov klænur, sigur hann.

# Suðuroyingar fáa tryggari samband

TELESAMSKIFTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

**Suðuroy:** Føroya Tele fer nú undir ymsar útbyggingar í Suðuroynni fyri at útvega suðuroyingum betri og tryggari telesamskifti.

Í hesum sambandi verður ljósleiðara kaðal lagdur frá Tvøroyri til Hvalba í hesum árinum.

Hetta er ein partur av eini størri verkætlan, sum byrjaði fyri trimum árum síðani, tá ið Føroya Tele fór undir at leggja ljósleiðara kaðalar í millum flest allar bygdinar í Suðuroynni úr Sumba til Tvøroyri og nú stendur so Hvalba fyri tørni.

Fróði Mortensen, sum er økisleiðari hjá Føroya Tele í Suðuroy, sigur, at í løtuni er tráðleyst samband av Tvøroyri til tær báðar norðastu bygdirnar í Suðuroy, men við ljósleiðarakaðalaninum er sambandi nógv tryggari.

Ljóskaðalin er samstundis fortreytin fyri at fáa breiðband til alnetið, sum er nógvar ferðir skjótari enn tað vanliga sambandi og ISDN.

Men hann leggur tó afturat, at enn er kortini ongin avgerð tikin um breiðband til Hvalbiar og Sandvíkar. Fyri at tað skal lata seg gera, skal eisini onnur útgerð setast upp.

Úr Hvalba liggur koparkaðal til Sandvíkar og so leingi frástøðan ikki av eini støð fer upp um fýra, fimm kilometrar, ber til at veita breiðband ígjøgnum koparkaðal.



*Føroya Tele er sjónligt í føroyska landslagnum, eisini ovast á Froðbiarkambi við frálíkum útsýni yvir oyggjarnar norðureftir. Føroya Tele hevur eina mastur á Kambinum, sum er 480 metrar høgur*

Men yvirhøvur er nógv betri møguleikar við einum ljóskaðali. Eitt nú ber tað til at at senda sjónvarp ígjøgnum ein slíkan kaðal, skuldi tað blivið aktuelt einaferð.

– Hetta verður gjørt fyri at nútímansgera og tryggja telesamskiftið í Suðuroynni, soleiðis at suðuroyingar eisini kunna fáa ágóðan av framtíðar fjarskiftismøguleikum, sigur Fróði Mortensen.

Eisini hevur Føroya Tele avgjørt at skifta radioútgerðina út, sum alt telesamskifti ímillum Suðuroynna og restina av landinum gongur eftir.

Hetta verður eisini verður gjørt fyri at útvega suðuroyingum tryggari samband.

Í løtuni er alt telesamskifti ímillum Suðuroynna og meginøkið tráðleyst. Nú er ætlanin at hava tráðleyst samband ímillum Húsareyn og Skopun, ljóskaðal úr Skopun til Sands og so tráðleyst av Sandi til Suðuroyar, helst á Nakk omanfyri Froðba, og so í ljóskaðal av Nakki, víðari til bygdirnar í Suðuroy, sum hava ljóskaðal, síðani niðan á Spáafelli omanfyri Sumba, og haðani verður aftur tráðleyst samband norður á Húsareyn.

– Tað merkir, at sambandið gongur í ring og svíkur annað sambandið, er hitt sambandið eftir.

Annars hevur brek eisini verið á telefonsambandinum til Hvalbiar og Sandvíkar tær báðar seinastu vikurnar. Ein avleiðing av hesum hevur verið, at telefonfelagir hava verið í vanda fyri at vera avbrotnir mitt í eini samrøðu.

Føroya Tele heldur, at brekið tók seg upp eftir toran hevur sligið niður í útgerðina, sum samskiftir við Hvalba og Sandvík.

Men nú hevur Føroya Tele skift eina ein part av útgerðini út, so nú skuldi trupuleikin verið loystur.

Tøknini, sum mennist støðugt.



# Gravgangur eftir Húsarhaldsskúlanum

**Húsarhaldsskúli Føroya er ein sera vælumtóktur skúli í landinum. Skúlin hevur so nógvar umsóknir til skeiðið í ár, at dupult so nógvir næmingar, sum sleppa inn, hava fingið noktandi svar**

SKÚLI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
– Sigast kann, at tað standa eini 40 næmingar á bíðilista, og enn er bara februar. Um ikki avboð koma, so sleppur ongin afturat inn til komandi skeið, sum byrjar í heyst, sigur Jóhanna á Tjaldrafløtti, leiðari á Húsarhaldsskúla Føroya.

Skúlin hevur fingið 62 umsóknir til komandi skeið, sum byrjar í august. Enn er ikki komið út á várið, so tískil kunnu enn fleiri umsóknir væntast.

Serliga gentur í hópatali søkja, og har eru ongi krøv, sum ein skal lúka fyri at sleppa inn.

– Tað eru simpulten tær, sum eru fyrst at søkja, sum sleppa inn, sigur Jóhanna. Hon hevur starvast á skúlanum í 12 ár nú, og tey seinastu níggju sum leiðari. Ongantíð hevur hon vitað um størri gravgang eftir skeiðinum enn nú. Og tað er ein trupulleiki.

– Sjálvandi var tað ynskiligt, at allir umsøkjararnir sluppu inn, men vit hava simpulten ikki pláss fyri meira enn 21 næmingum í senn, sigur hon.

### Afturstig

Fyri nøkrum árum síðani vóru tvey skeið um árið á skúlanum. Men hetta heldur Jóhanna ikki er nakað gott hugskot at fara aftur til fyri at kunna taka fleiri næmingar inn.

*Ein øgiligur gravgangur er eftir at sleppa á Húsarhaldsskúla Føroya. Longu nú hava yvir 60 sent umsókn inn, og skeiðið byrjar ikki fyrr enn í august*
*Savnsmynd*



– Tá hugsar man bara um kvantitet og ikki kvalitet, sigur hon.

Skeiðið á skúlanum er vorðið munandi betur við, at tað varð longt upp í sjey mánaðir ístaðin fyri fimm, tí hetta gav lærarunum møguleika til at fara í dýpdina við summum evnum. Nakað, sum ikki bar so væl til, tá skeiðið einans var fimm mánaðir, tí stundir vóru ikki til tað.

Ein onnur orsøk fyri, at skeiðið varð lagt um til at vera eitt og ikki fullar tíggju mánaðir, er, at fáa annað virksemi inn í skúlan. Klænkiskeið og onnur skeið, sum fólk hava tikið væl undir við.

J óhanna fegnast um tað og heldur, at um tey fóru aftur til at hava tvey skeið um árið, so hevði tað verið eitt afturstig.

### Nýggjur skúli

Jóhanna dylir ikki fyri, at tað hevði verið ynskiligt at fingið ein nýggjan Húsarhaldsskúla. Hon heldur, at nógvu umsóknirnar eru eitt tekin um, at tørvur er á einum størri skúla, sum kundi tikið ímóti fleiri næmingum.

– Ikki so ræðuliga stóran skúla, men eitt sindur størri enn tann, vit hava nú, sigur hon.

Tað letur ikki til at vera nakar trupulleiki, at skúlin liggur í Klaksvík. Umsóknir koma allastaðni frá í landinum, og tað eru tey, sum eru fyrst at søkja, sum sleppa inn.

– Hetta hevur verið mannagongdin, og hon hevur virkað væl, men ikki í ár. Tí nú eru so nógvir umsøkjarar, at 40 hava fingið avslag sendandi í dag, og tað er ræðuligt, sigur ein ógvuliga hørm Jóhanna á Tjaldrafløtti.

Hon sigur, at tað ber ikki til at søkja til skeiðið í 2005 enn, tí so væntar hon, at tey høvdu mist tráðin á skúlanum. Lýst verður, nær søkjast kann inn á skúlan til skeiðið 2005 og so ræður um at vera skjótur. 21 tey fyrstu sleppa inn.

# Vórðu heiðrað fyri sigurin

**Mánakvøldið og týsmorgunin vóru móttøkur hildnar fyri teimum báðum Ellu Mariu og Dánjali Jákupi, sum hava vunnið gull í liðkapping fyri juniorar í boccia í Malmø Open**

MÓTTØKA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*11 ára gamla Ella Maria var ovfarin av hóvastákinum, sum varð gjørt burturúr, tá hon kom aftur í skúla eftir at hava verið við til at vinna gull í boccia í Malmø Open*
*Mynd: Norðlýsið*

Móttøkan fyri Dánjal Jákupi var mánakvøldið í bygdarhúsinum á Strondum. Floksfelagar og foreldur vóru savnað saman. Onkur foreldur høvdu bakað køku. Flokslærarin Andras Danielsen segði nøkur orð, og Dánjal Jákup fekk handað blómutyssi og eina ítróttardrakt frá flokkinum.

Í Klaksvík varð móttøkan hildin í skúlanum við Ósánna mikumorgunin.

Símun Petur Hjelm skúlastjóri tók orðið, tá morgunsangurin var av. Síðani kom Jórun Høgnesen sum umboð fyri kommununa og handaði Ellu Mariu eina gávu frá kommununi. Eina hálsketu.

Síðani spældu Sólgerð Færø og Helga Gerðalíð eitt lag á tvørfloytu og klaver. Og so var móttøkan við morgunsangin av.

Kommunan bjóðaði flokkinum góðgæti og Sunkist, so meðan hinir flokkarnir fóru til vanliga undirvísing eftir móttøkuna, sluppu næmingarnir í 5. b og Ella Maria at hugna sær saman við flokslærara og øðrum, sum vóru tilstaðar.

Hetta er tíggjunda ferðin, at Malmø Open í boccia verður hildin, og fyrstu ferð, at steypið er komið til Føroyar.



*Dánjal Jákup Djurhus av Strondum fekk somuleiðis góða móttøku, tá hann kom aftur til Strendur týskvøldið*
*Mynd: Jonhard Hammer*

# Tunnusláttur á sjónum

**Árligi tunnusláttur-in hjá Tórshavnar Froskmannafelag verður komandi leygardag**

FØSTULÁVINT
*Solby A .Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Sum mongu undanfarnu árini fer Tórshavnar Froskmannafelag aftur at sláa tunnu á Føstulávint í ár. Leygardagin klokkan 14 fara kavarar at sláa tunnu á sjónum. Hetta plagar vanliga at ganga fyri seg har, sum Ritan leggur at.

Tað serliga í ár er, at Havnar hornorkestur kemur at seta teirra dám á tunnuslátturin. Havnar hornorkestur flutti herfyri í nýggj høli í grannalagnum hjá Froskmannafelagnum. Samanhaldið er gott har í grannalagnum, og sæst hetta aftur við, at hornorkestrið kemur við sínum tónleikaískoyti til tiltakið.

Tá kavarar fara á bláman at sláa tunnu, verður kongafiskurin funnin. Hesin fær eina gávu, sum hevur eitt ella annað við kaving at gera.

### Tunnusláttur á landi

Men tað er ikki bara á sjónum, at felagið slær tunnu. Seinni um kvøldið verður aftur skipað fyri tunnuslátri. Hesuferð í hølum felagsins ella uttanfyri, um tað viðrar. Hetta byrjar klokkan 19.

Tá tunnuslátturin er av, verður borðreitt við eini heilt serligari froskmannasúpan.

– Ein fiskasúpan, sum vit ikki kunnu vera fyri uttan, sigur Heri Andreasen, formaður í froskmannafelagnum.

Vanliga eru heilt fitt av áskoðarum til tunnusláttturin á sjónum hjá froskmannafelagnum.



*Árligi tunnuslátturin hjá Tórshavnar Froskmannafelag verður leygardagin 21. februar klokkan 14*
*Savnsmynd*